
VEST
MANNA
DAGAR
20
23

# GÓÐU VESTMENNINGAR OG GÓÐU GESTIR



Vælkomin til Vestmannadagar, sum verða hildnir fyri tíggjundu ferð. Hesa ferð er mentanarvikan stytt í døgum og tiltøkini savnað í økir.

Hósdagin halda vit til oman fyri skúlan og í Viðarlundini. Fríggjadagin flyta vit okkum inn á Fjørð, har virkini sjálv skipa fyri ymiskum.

Leygarmorgunin verður afturvendandi morgunmatarborðið í Ítróttahøllini, har "Ársins herðaklapp" verður avdúkað. Restina av leygardegnum er Bakkavegur karmur um fjølbroyttu tiltøkini.

Vestmanna bygdarráð bjóðar øllum at vera vælkomin til Vestmannadagar 2023.

# MIKUDAG 6. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| **18:00** | **SILKIENNI** | **SJAVSKAPPING**<br>*Vinnandi liðið vinnur eitt gávukorrt á 2000,- frá Meira av tí góða.* |

# HÓSDAG 7. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| **09.30** | **DAGSTOVNAØKIÐ** | **BAMSURENNINGIN, "ØLL BØRN ERU VINNARAR"**<br>*Barnabati og dagstovnaøkið í Vestmanna kommunu skipa fyri bamsurenning fyri børn á dagstovnaøkinum. Bamsurenning varpar ljós á Betri vinir, ið er ein fyribyrgjandi verkætlan ímóti happing.* |
| **15:00 - 17:00** | **HEILSUMIÐSTØÐIN** | **GRILL FYRI ØLL**<br>*Børn og vaksin boðin til grill.*<br>*Vestmanna hornorkestur og Sergio luttaka.* |
| **15:00 - 17:00** | **HEILSUMIÐSTØÐIN** | **OPIÐ HÚS Í FRÍTÍÐARSTOVUNI**<br>*Øll eru vælkomin at síggja frítíðarstovuna og at heilsa upp á børn og vaksin. Gestirnir fáa ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið.* |
| **17:00** | **VIÐARLUNDIN** | **SJÓRÆNARAVEIÐUBINGO-TÚRUR FYRI BØRN**<br>*Kom við í viðarlundina, har vit byrja við at gera sjórænaraklaffar og fáa útflýggjað sjórænarakort sum eisini er ein bingopláta. Hoyr sjórænarasøgur og ger ymisk spøl og gátur fyri at koma til næsta post. Børnini fáa ein pakka í part, tá skatturin er funnin. Børnini møta í viðarlundshúsinum.* |
| **17:00 - 19:00** | **Á HEYGUM Í HANDLINUM HJÁ ELSU OG SIGURD** | **LISTAFRAMSÝNING VIÐ HERIT MAGNUSSEN (FERNISERING VERÐUR KL. 17:00)**<br>*Herit Magnussen hevur málað síðan 2017 og sýndi fram fyrstu ferð í 2018 á Vestmannadøgum saman við øðrum. Herit hevði sína fyrstu staku málninga-framsýning í 2021 í handlinum hjá Elsu og Sigurd, Ovari vegur 3.*<br>*Umframt málingar eru hesa ferð eisini grafisk verk við á framsýningini ymiskum teknikkum, so sum oljukrit, linoleum, etjing, carborundum, djúpprent, monotypi, syanotopi og releiff.* |
| **17:00 - 20:00** | **HJÁ NICOLINU** *(Bakkavegur 4)* | **KAFE OG LISTAFRAMSÝNING**<br>*Við listafólki úr Vestmanna.*<br>*Anna á Rógvu, Kirstin Helgadóttir, Laila Nicolajsen og Helga Olsen Gásadal.*<br>*Disvoy skipar fyri.* |
| **18.30 - 19.30** | **HEIMIÐ Á GRØNANESI** | **SANGLØTA**<br>*Sangløta við Ólavi Højgaard og Niels Olsen.*<br>*Øll eru hjartaliga vælkomin.* |
| **20:00** | **SILKIENNI** | **PUB QUIZ VIÐ VAGNUR STREYMOY**<br>*Lið við 4 fólkum kappast. Vinningur verður latin.* |

# FRÍGGJADAG 8. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| **9.00 - 21.00** | **FJØRUKRÓGVIN** | **FJØRUKRÓGVIN HEVUR LONGUR OPIÐ**<br>*Vitja SøguSavnið «Einasta voksmuseum í Føroyum»*<br>*Tú fært 50% í avsláttri, um tú vitjar SøguSavnið hendan dagin.* |
| **15:00 - 17:00** | **MIÐNÁM Í VESTMANNA** | **MIÐNÁM BJÓÐAR ØLLUM TIL OPIÐ HÚS.**<br>*Á skránni er rundvísing og frágreiðing um skúlan. Høvi verður at síggja egnu kyknur og aðrar í mikroskopi. Eisini ber til at síggja ymisk føroysk skordjór í mikroskopi. Vit bjóða okkurt gott bæði til børn og vaksin.* |
| **15.00 - 18.00** | **VEST PACK** | **VESTPACK HEVUR OPIÐ HÚS**<br>*Rundvísing á virkinum.*<br>*Høvi verður at síggja myndir og annað av plastframleiðsluni í Vestmanna.*<br>*Vit bjóða til eina hugnaliga løtu fyri bæði vaksin og børn.* |
| **15.30** | **SEV** | **EITT TRÆ VERÐUR PLANTAÐ VIÐ NÝGGJU KOBLINGSSTØÐINA**<br>*Bjørg á Rógvi, borgarstjóri í Vestmanna, Jón Kragesteen, formaður í Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag og Hákun Djurhuus, stjóri í SEV planta eitt træ framman fyri nýggju koblingsstøðina. Træið er gáva frá FNU til SEV í sambandi við 75 ára haldið hjá SEV, og SEV ynskir, at træið verður plantað í Vestmanna, har SEV hevur sín uppruna, og sum er miðdepil fyri ein stóran part av virkseminum hjá SEV.*<br>*Opið hús verður á Fossáverkinum kl. 15.30-17.00, og framsýning er á takinum á koblingsstøðini.* |
| **16:00 - 19:00** | **Á HEYGUM Í HANDLINUM HJÁ ELSU OG SIGURD** | **LISTAFRAMSÝNING VIÐ HERIT MAGNUSSEN Á OVARA VEGI 3** |
| **17:00 - 20:00** | **HJÁ NICOLINU** *(Bakkavegur 4)* | **KAFE OG LISTAFRAMSÝNING**<br>*Við listafólki úr Vestmanna.*<br>*Disvoy skipar fyri.* |
| **17:00** | **MIÐNÁM Í VESTMANNA** | **MIÐNÁM Í VESTMANNA - BIOGRAFUR, TOMBOLA O.A.**<br>*Kl. 17:00 Kaffistova*<br>*Kl. 17.00 Tombola*<br>*Kl. 18:00 Bio-kioskin letur upp*<br>*Kl. 18:00 Barnabigrafur, "Madagascar" Kr. 50,-*<br>*Kl. 21.00 Ungdómsbiografur, "The Kissing Booth" Kr. 50,-*<br>*2. flokkur á Miðnám skipar fyri tiltøkum. Innkomni peningurin fer til námsferð í oktober.* |
| **18:00** | **MAGN & ESSAN** | **MAGN OG ESSAN HAVA OPIÐ**<br>*Teir væl umtóktu smyrjibreyðsbakkarnir vera til sølu.*<br>*Eisini fara tey at selja eina kryddaða høsnarungasuppu úr garaguni. Vónandi verður veðrið til vildar, tí ætlanin er at hava sitipláss uttanfyri, so mann kann njóta suppuna og smyrjibreyðið.* |
| **21:00 - 22:00** | **CAMPING VESTMANNA** | **KONSERT VIÐ SÁMALI RAVNSFJALL INNI Á VESTMANNA CAMPING**<br>*Øll eru hjartaliga vælkomin.* |
| **22:00** | **FAER ISLES DISTILLERY** | **VITJA FAER ISLES DISTILLERY**<br>*Guðrun Sólja & Janus Kampmann koma at syngja og spæla. Møguleiki er fyri at royna fleiri enn 50 sløg av single malt whiskey.* |

# LEYGARDAG 9. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| 09:30 - | HØLLIN | **FELAGS MORGUNMATUR, TÓNLEIKUR OG ÁRSINS HERÐAKLAPP VERÐUR HANDAÐ**<br>*Laila Haldansen, forkvinna í Mentanarnevndini heldur røðu, og Bjørg á Rógvi, borgarstjóri avdúkar Ársins herðaklapp.* |
| 09:30 - 12:00 | BÓKASAVNIÐ | **BÓKASAVNIÐ ER OPIÐ**<br>*Øll eru vælkomin at støkka inn á gólvið á bókasavninum. Møguleiki er fyri at keypa bøkur fyri 1 kr stk.* |
| 10.30 | SKÚLAVØLLURIN | **SANDKASSAFÓTBÓLTUR**<br>*Rørslubani og tombola - MB Vestmanna* |
| 11:00 | VIÐ BRÚNNA | **GONGUTÚRUR VIÐ INGA OLSEN SUM FERÐALEIÐARA**<br>*Gongutúrur niðan í gjónna, vit hittast við brúnna. Hetta er ein lættur túrur, tó kann tað verða ringt at ganga í støðum. Minst til góðar skógvar.* |
| 12:00 | BAKKAVEGUR | **LJÓÐ- OG LITRÍKUR SÚKKLUTÚRUR Í BYGDINI**<br>*Kom við ein stuttligan súkklutúr. Byrjað verður á Bakkavegi við húsið hjá Nikolinu. Túrurin er fyri øll, børn sum vaksin. Lat teg í okkurt spraklandi litfagurt og hav dútthorn ella okkurt annað, sum ber til at festa á súkkluna, og sum gevur gott ljóð. So hoyrast og síggjast vit. Heitt verður á luttakararnar um at brúka hjálm. Okkurt verður til børnini, tá tey koma aftur.* |
| 12:00 - 20:00 | HJÁ NICOLINU *(Bakkavegur 4)* | **KAFE OG LISTAFRAMSÝNING**<br>*Við listafólki úr Vestmanna.*<br>*Disvoy skipar fyri.* |
| 13:00 - 15:00 | SILKIENNI | **MARKNAÐARDAGUR**<br>*Tilmelding til søluborð fer fram hjá Anju Haldansen við at senda boð á 522253.* |
| 13.00 | BAKKAVEGUR | **BARNATILTAK VIÐ BUBU** |
| 13.00 - 15:00 | BAKKAVEGUR | **GITA VEKT Á EINUM HEILUM LAKSI**<br>*Vinningur frá Hiddenfjord verður latin. Vinnarin verður funnin til felagssangin kl. 21.00.* |
| 13:30 | REYÐA TORGIÐ | **BREKKUSÚKKLUKAPPING**<br>*Tórshavnar Súkklu- og Triathlonfelag skipar fyri fyrstu ferð eina brekkusúkklukapping í Føroyum. Kappingin er einføld, súkkla eina brekku.*<br>*Brekkan, ið súkklað verður, er Miðalsbrekka, 1,5 km við miðalhalli 7,3%. Ein hóskandi avbjóðing har øll kunnu verða við, skal ein gerast drotning ella kongur av brekkuni, so krevst meira.*<br>*Vinningar verða latnir til kong, drotning, besta Vestmenning og U23.*<br>*Tilmelding á Reyða Torginum.* |
| 13:45 - 14.45 | BAKKAVEGUR | **PLAYLISTI**<br>*Tey ungu, sum ganga á Staðnum, skipa fyri.* |
| 14:00 | BAKKAVEGUR | **“GULI HÁLVMÁNIN” KOMA VIÐ SÍNUM MOTORSÚKKLUM** |
| 14:00 - 16:00 | BAKKAVEGUR | **BARNATILTAK VIÐ SKÓTUNUM ÚR KVÍVÍK** |

| | | |
|---|---|---|
| **14:00 – 19:00** | **Á HEYGUM Í HANDLINUM HJÁ ELSU OG SIGURD** | **LISTAFRAMSÝNING VIÐ HERIT MAGNUSSEN Á OVARA VEGI 3** |
| **15:00** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ FRÓÐA BJARNASON**<br>*Í 2018 gav Fróði Bjarnason tvey stakløg út – Where My Home Is og Scandinavia, og Í 2021 gav hann út sína debututgávu, Stationary Things, og løgini á tí útgávuni hava verið nógv at hoyrt í føroyskum útvarpi.*<br>*Við útgangsstøði í akkustiskum singer/songwriter-tónleiki, sum er grundarlag fyri einum livandi og skerandi sangteksti, er tónleikurin hjá Fróða Bjarnason bæði ein vælkomandi og spennandi uppliving.* |
| **15:30** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ HERBORG TORKILSDÓTTIR**<br>*Herborg er kend fyri at skriva sínar bersøgnu, væl-lýstu og beinraknu sangir. Hon hevur givið fleiri løg út, sum lýsa tað góða og tað ringa, ið lívið hevur at bjóða. Hetta hava fólk ordiliga tikið til sín.* |
| **16:00 – 17:00** | **KAIIN** | **FISKIKAPPING FYRI BØRN**<br>*Fiskikapping verður fyri børn á kaiini niðan fyri fiskavirkið. Tann, sum fær tyngsta fiskin, vinnur. Vinningar, sum eru gávukort frá Disvoy, verða latnir til nr. 1, 2 og 3 í kappingini. Foreldrini hava ábyrgdina av børnum sínum.* |
| **17:30** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ AMIGOS**<br>*Amigos er ein tónleikabólkur, sum fyri tað mesta spælir léttan og væl svingandi dansitónleik heilt frá 60'unum og fram til í dag. Bólkurin hevur spælt ymsa staðni runt um í landinum og fingið góða undirtøku millum fólk. Tað eru teir tríggir, Joen Magnus Danielsen úr Vestmanna, sum syngur og spælir kassaguitar, Ólavur Øster, guitar, og Jógvan Olsen, klaver og keyboard, sum manna bólkin.* |
| **18:00** | **STAÐIÐ** | **KONSERT VIÐ MARIONNU WINTER**<br>*Marianna Winter er eitt av teimum heilt spennandi nøvnunum í føroyskum tónleiki. Sangarinnan skrivar fangandi poppløg við modernaðari nostalgi, sjálvstilvitaðum humori og sálargranskandi tekstum, sum fanga tíðarandan og umskapa hann til nútímans tónlist. Tað eru sjáldsamir eginleikar, ið tala beinleiðis til ungdómin og óbeinleiðis til tey tilkomnu.*<br>*Hon er júst nú aktuel við nýggju stakløgunum, "Cruising", "People Pleaser" og "Consequences" hvørs tónleikasjónband spruttar við blóði og sjarmu.* |
| **18:45** | **STAÐIÐ** | **HUGNALIG HÁTÍÐARLØTA FYRI PAULA MAGNUSSEN**<br>*Ungdómshúsið hevur seinastu tíðina umvælt og nýtíðmansgjørt upptøku- og útvarpshølini, ið Pauli Magnussen sjálvur hevur uppbygt og lagað til. Leygardagin fara vit at lata nýggju hølini upp aftur og avdúka nýggja navnið á studionum til heiðurs fyri Paula Magnussen.* |
| **19.00** | **BAKKAVEGUR** | **GRILLAÐUR LAKSUR OG HUGNI**<br>*Allir vestmenningar eru vælkomnir at royna grillaðan laks frá Hiddenfjord. Grillað verður við Bakkaveg.*<br>*Tiltakið er ókeypis. Í barrini á økinum verður høvi at keypa sær okkurt gott til góman. Avmarkað nøgd av laksi.* |
| **19:30** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ JENS MARNA HANSEN**<br>*Jens Marni er ein av royndastu tónleikarum í Føroyum og hevur ríkað føroyska mentanarlívið seinastu mongu árini.* |
| **21:00** | **BAKKAVEGUR** | **FELAGSSANGUR VIÐ FINNI KOBA**<br>*Uttandura felagssangur.*<br>*Finnur Koba skipar sangin.* |

| | | |
|---|---|---|
| **22:00** | **BAKKAVEGUR** | **FØROYSKUR DANSUR**<br>*Við Norðurstreymoyar Dansifelag.* |
| **23.00** | **SILKIENNI** | **DANSUR VIÐ BRIM** |

# SUNNUDAG 10. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| **11:00** | **KIRKJAN** | **SKAPANARGUÐSTÆNASTA**<br>*Við Steintóru G. Joensen, presti.*<br>*Magni Christiansen luttekur.* |
| **14:00** | **KOMMUNUHØLLIN** | **GONGUTÚRUR VIÐ INGA OLSEN SUM FERÐALEIÐARA**<br>*Gongutúrur niðan gjøgnum Fossá og Bjarnadal og haðani niðan á Loysingarfjall.*<br>*Vit hittast við Fossá.* |
| **14:00 - 17:00** | **Á HEYGUM Í HANDLINUM**<br>**HJÁ ELSU OG SIGURD** | **LISTAFRAMSÝNING VIÐ HERIT MAGNUSSEN**<br>**Á OVARA VEGI 3** |
| **17.00 - 19.00** | **MISSIÓNSHÚSIÐ** | **OPIÐ HÚS, KAFÉ OG SANGUR**<br>*Hjartaliga vælkomin.* |